# Útbjóðingarskriv

## Oracle samstarvspartnari til meginskipanina hjá Akstovuni

**Februar 2026**

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

# 1 Innihaldi

1 Innleiðing ........ 3
2 Útbjóðari ........ 3
3 Uppgávan ........ 3
4 Samstarv og karmar ........ 3
5 Krøv og ynskir til veitaran ........ 4
6 Meting av tilboðum ........ 4
7 Tillutan av sáttmála og endi á útboði ........ 5



Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

# 1 Innleiðing

Akstovan hevur í dag ein skipan, ið verður rópt Meginskipanin. Skipanin inniheldur í høvuðsheitum dátur um koyrikort, akfør og sýn, og er ein partur av kritiska infrastukturinum undir landinum. Markamótini eru nógv, t.d. Løgreglan, Gjaldstovan, Samleikin, Skjáttan, Hagstovan, bilasølur, tryggingarfeløg o.s.fr. Skipanini er sostatt eisini grundarlagið undir týðandi politiskum avgerðum.

Skipanin er ment í einum Oracle umhvørvi, ið byggir á eldri teknologi. Leita verður tískil eftir einum samstarvspartnara, ið kann hjálpa Akstovuni at framtíðartryggja skipanina, og veita hjálp í samband við dagligan rakstur.

# 2 Útbjóðari

Útbjóðari er Akstovan og kontaktpersónur er Kim Hansen, kimh@akstovan.fo, +298 780 431.

# 3 Uppgávan

- Høvuðsuppgávan er ráðgeving og menning í Oracle APEX. Meginskipanin byggir á Oracle teknologi og er ment í Oracle Forms. Partur av henni er ment í APEX, neyðugt er tískil, í fyrsta umfari, at fáa restina ment í APEX.
- Haraftrat er talan um dagligan rakstur av Meginskipanini í samstarvið við aðrar KT-veitarar, ið Akstovan nýtur.

# 4 Samstarv og karmar

Akstovan ynskir at arbeiða uppá tímabasis, har fokus er á menning og skjóta tilpassan til broytingar, heldur enn langar kravlýsingar. Neyðugt er tískil, at komandi veitarin skilir og dugir at taka hædd fyri, at stovnurin er pressaður í tí dagliga, og tískil eisini kann leggja arbeiðið til rættis, so at stovnurin hevur møguleika at rúma tí nýggju menningini og teimum broytingum, ið vilja fylgja við slíkum arbeiði.

Akstovan stendur sjálv fyri projektleiðslu og líknandi, og mett verður, at tað er møguligt, samla sæð, at brúka umleið eitt ársverk um ári innanhýsis tey komandi trý árini.

Ein sáttmálið verður gjørdur við veitara, ið byggir á ein á tímaprís. Uppskot um sáttmála er lagt við útboðstilfarinum.

# 5 Krøv og ynskir til veitaran

Krøv, ið skulu verða uppfylt.

Veitarin skal

- hava ment aðrar KT-skiparnir. Hetta er ikki tann fyrsta.
- hava royndir við Oracle generelt. Hetta skal dokumentarast.

Uppfyllir man ikki hesi bæði krøvini, verður tilboðið avvíst.

Veitarin skal lata inn eina lýsing av tveimum dømum uppá KT-skiparnir, ið veitari hevur verið við til at ment. Lýsingin skal í mesta lagi fylla eina A4 síðu samanlagt.

Haraftrat skal ein lýsing vera av mennarum og innahýsis oracle umhvørvinum. Skal í mesta lagi fylla eina A4 síðu.

Vit ynskja eisini at veitarin er á einum støði við royndum og stødd, at farast kann undir menning at kalla beinanvegin.

Harumframt er tað eitt ynski, at veitarin hevur starvsfólk við viðkomandi útbúgvingum í mun til ráðgeving og menning

# 6 Meting av tilboðum

Sáttmáli verður tillutaður fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís, førleikar, krøv og ynskir. Vektingin er fylgjandi:

- Prísur 50%
- Førleikar 50%



Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

Í samband við førleikar, er talan um eina heildamynd í mun til ynskir.

- Royndirnar við KT-meinning vekta 25%,
- Umhvørvið, útbúgving í mun til ráðgeving og menning í Oracle Forms og APEX 25%

Fyri at forða fyri dumpan av prísinum, verður ein tímaprísur lægri enn 600 kr./tíma ikki góðtikin. Tað merkir, at er prísurin lægri, so vektar hann sum um hann var 600 kr./tíma.

# 7 Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Tilboðsgevari skal samstundis, sum tilboðsskjal verður latið inni, vátta við trú og heiður, í hvønn mun viðkomandi hevur skuld til tað almenna.

Akstovan tekur avgerð um, at tilluta sáttmálan, tá ið avgerð er tikin um hvat av tilboðunum er fíggjarliga mest skynsama í mun til prís og førleikar. Akstovan treytar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði um rímiligar orsøkir eru til tað.

Tilboð, ið verða latin inn ov seint verða avvíst.

Sjálvt um sáttmálin verður tillutaður, eru tilboðsgevarar bundnir av sínum tilboði til Akstovan hevur undirskrivað sáttmála. Tó í mesta lagi 3 mðr.

Útreiðslur, ið tilboðsgevarar hava í sambandi við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri Akstovuna. Hetta er eisini galdandi, um Akstova tekur avgerð um, ikki at taka av nøkrum tilboði.

Akstovan  er fevnd av "Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina"

Tíðafreistir o.a. í samband við útboðið, eru at síggja á Keypsportalinum.